– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# UNDIR KONGAVARÐA – nú flyta tey inn

- og enn hevur tú møguleikan at vera við









### Tað nýggjasta

Tey fyrstu eru longu flutt inn í raðhúsini, og í næstum flyta tey fyrstu inn í punkthúsini. Koyrir tú ein túr í økinum er umhvarvið av einari frálíkari bústaðarloysn við at koma til sjóndar. Enn eru nakrar fáar búeindir eftir, so enn hevur tú møguleikan at vera við.

### Eftir til sølu

Nú eru nevniliga bert 6 raðhús á 209 m² eftir til sølu eins og 8 íbúðir á 131 m², sum er á stødd við eitt 1-planshús, og 4 handils- / vinnuhølir á 130 m².

### Býlingurin og umhvørvi

Býlingurin verður sum frá líður ein nýggjur og heilskapaður býarpartur við skipaðum arkitekturi, ið gevur fólki avbjóðingar, frið og tryggleika. Alt verður gjørt liðugt millum húsini við vegi, gongubreyt, spæliplássi, sparkivølli og hugnaligum umhvørvi, og stóru vindeyguni geva ljósinum frítt spæl og leggja Nólsoyarfjørð og Havnina opna fyri eygað.

### Bústaðirnir

Suðureftir og vestureftir móti sólini er altan ella terassa, og íbúðirnar eru sera ljósar og rúmligar við stórum vindeygum. Í køki og stovu eigur útsýnið í ovaru hæddunum ikki sín líka – á degi hin livandi vágin við skipum og bátum, á kvøldi luftin og bleiktrandi ljósið frá vakra høvuðsstaðnum. Raðhúsini liggja við stórum vindeygum og panoramaútsýni móti Havnini og fjørðinum og við terassu og altan móti Glyvursnesi og sólini.

### Persónligur stílur

Bústaðirnir verða sera fjølbroyttir, har familjan kann innrætta seg eftir áhuga og ynski – alt eftir støð og tali á rúmum. Møguleiki verður fyri sjálvur at velja millum ávís sløg av gólvum og ymiskum sniðum og litum til køkin. Her ber til at skapa sær tað heilt rætta heimið við persónligum stíli.

### Liviligt og lívligt

Millum húsini verður felagsøki, har grannarnir hava møguleika fyri at skipa fyri ymiskum. Her eru gróðursettir runnar, ið geva lívd og nærleika til hugna og spæl, og her eru hyljareygu, spæliðláss, fótbóltsvøllur og annað, girt við snøggum laðingum og gøtum ímillum. Beint sunnanfyri er gøta niðan á Reyn, til nýggjan dagstovn og til spildurnýggja skúlan, ið stendur í gerð.

### Raðhúsini

**Hæddir:** 3
**Gólvvídd í alt:** 209 m²
**Ovasta hædd:** Trappugongd, stova / alrúm , baðirúm hjúnarrúm við útgongd til útigólv, 2 kømur
**Miðhædd:** Bilskýli, hjallur, grovkøkur, baðirúm, durur, køkur / stova
**Niðasta hædd:** Inngongd, trappugongd, stórt rúm á uml. 60 m²
**Prísur kr:** 2.919.735,00

### Íbúðirnar

**Hæddir:** 1
**Gólvvídd í alt:** 131 m²
**Innrætting:** Felags trappugongd við lyftu, gongd, køkur, stova, 3 kømur, 2 baðirúm
**Prísur úr kr:** 2.253.855,00









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Meira fæst at vita hjá P/F Inni – tel. 354200 og á heimasíðuni www.inni.fo